VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag
Skýggjað og regn av og á. Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi. Út á kvøldið minkar hann niður í gul til stívt andøvsgul. Hitin liggur millum 6 og 9 stig.



Veðrið leygardagin
Mest skýggjað og av og á regn ella ælingur. Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og eystri. Hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið sunnudagin
Skýggjað og regn av og á. Lot til andøvsgul av ymsum ættum. Hitin millum 6 og 9 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin
Skýggjað og regn ella ælingur. Sum frá líður klárar í. Lot til andøvsgul av ymsum ættum. Hitin millum 6 og 9 stig.

Øssur Johannesen hevur seinastu dagarnar sýnt fram í Smiðjuni í Lítluvík

Mynd: Jens Kristian Vang

– Menniskjað er sum ein fiól

Tað eru kenslurnar, ið skapa listina, heldur listarmaðurin, Øssur Johannesen

LISTAFRAMSÝNING

– Hjartað er ein fiól, sum spælir alt, sum eitt menniskjað hevur í sær.

Soleiðis sigur listarmaður Øssur Johannesen, sum í hesum døgum hevur sýnt fram myndir í Smiðjuni í Lítluvík.

Øssur sýnir fram afturvendandi andlitsmyndir, sjálvsmyndir – bæði oljumálningar og koltekningar.

Øssur sigur sjálvur, at tað eru kenslurnar, ið skapa listina, og ert tú kensluborin, so kemur tú í samband við kreftir, sum eru sterkari enn tú sjálvur.

Øssur Johannesen er eisini tónleikari, og tað sæst aftur í listini - har tú eitt nú sært eina fiól.

Bera post í Havn

Nakað av iva hevur verið um postútberingina í høvuðsstaðarøkinum, av tí at akførini kanska fóru at mangla bensin ella olju.

Bilarnir og knallertirnar hjá postboðunum sum koyra út frá posthúsinum í Havn hava nóg mikið av bensini til hesa og komandi vikuna, sigur Agnar Bech, virkandi formaður hjá postboðunum í Havn.

mg

Fundur um Darwin

Almennur fyrilestur á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya fríggjadagin 23. mai 2003 kl. 15.

Jarl Giske, professari á Universitetinum í Bergen, heldur fyrilestur, ið hann kallar: Evolusjon og kristen tro, en uunngåelig konflikt?

Jarl Giske er professari í lívfrøði á Universitetinum í Bergen, har hann undirvísir í evolutiónsteori. Hann er í hesum døgum á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum sum gestalærari. Hendan fyrilesturin fer hann at skipa bæði sum studentafyrilestur og almennan fyrilestur.

Líka síðan Darwin kom fram við sínari evolutiónsteori, hevur tvístøða verið millum skapanarsøguna og evolutiónsteoriina. Ofta hevur henda tvístøða verið um aldurin á jørðini og á fossilum, og um hesi nú munnu vera so gomul, sum nátturuvísindafólk siga tey at vera, ella um møguliga finnast aðrar frágreiðingar um hesi viðurskifti. Sum tíðin er liðin, eru so nógv prógv fingin til vega um evolutiónina, at tað í dag er nógv lættari at eygleiða evolutiónina í náttúruni, enn tað er at eygleiða Guð.

Avbjóðingarnar hjá evolutiónsteoriini móti gudstrúnni eru í dag ikki einans aldurin á jørðini, ella hvussu menniskjan varð til, men eisini spurningar um, hvussu moralur og tilvitan vórðu til, og hvussu hesi broytast. Hetta hevur so aftur ávirkan á fatanina av okkara fría vilja.

Evolutiónsbiologar hava ikki fyri neyðini at taka Guð við í sínar greiningar av náttúruni og náttúruviðurskiftum, men er tað hóast hetta møguligt bæði at halda fast við sína kristnu trúgv og samstundis hava áliti á tí modernaðu evolutiónsbiologiini?

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	–
Nuuk	–
Qaqortoq	–
Ammassalik	–
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	–
Seyðisfjørður	–
Tórshavn	–
Lerwick	–
Aberdeen	–
London	–
Tromsø	–
Bergen	–
Oslo	–
Stokkhólm	–
Keypmannah.	–
Helsinki	–
Moskva	–
Berlin	–
Warzawa	–
Kiev	–
Bukarest	–
Paris	–
Madrid	–
Róm	–
Malorca	–
Athen	–
Malta	–
Tunis	–
Beijing	–
New Dehli	–
Bangkok	–
Jakarta	–
Sydney	–
New York	–
Miami	–
Los Angeles	–
Meksikobýur	–
Panama	–
La Paz	–
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	–

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst vestan fyri Skotland gongur eysturyvir og snarar norðurá. Tað verður væntandi yvir Føroyum um vikuskiftið.



Týsdagin fer tað eysturyvir aftur, men eitt nýtt lágrýst nærkast av útsynningi.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 21/05 kl. 06⁰⁰– 22/05 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,6°
Minsti hiti máldur í mai: ÷3,0° Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 21/05 kl. 06⁰⁰–22/05 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mai: 75,5 mm

VESTFALLSKYRRINDI

15. mai: Mánin næstur jørðini
23. mai: Seinna kvarter
28. mai: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
23. mai	01.35	14.12	00.35	13.12	00.50	13.27	03.35	16.12	04.35	17.12	—	12.27	11.27	—	01.50	14.27	02.50	15.27	01.20	13.57	02.35	15.12
24. mai	02.47	15.22	01.47	14.22	02.02	14.37	04.47	17.22	05.47	18.22	01.02	13.37	00.02	12.37	03.02	15.37	04.02	16.37	02.32	15.07	03.47	16.22
25. mai	03.41	16.01	02.41	15.01	02.56	15.16	05.41	18.01	06.41	19.01	01.56	14.16	00.56	13.16	03.56	16.16	04.56	17.16	03.26	15.46	04.41	17.01
26. mai	04.20	16.39	03.20	15.39	03.35	15.54	06.20	18.39	07.20	19.39	02.35	14.54	01.35	13.54	04.35	16.54	05.35	17.54	04.05	16.24	05.20	17.39

5 707265 100050 >